§ 1

Skúvoyar Forminnafelag og Skúvoyar Bygdarráð seta á stovn sjálvsognarstovnin Skúvoyar Bygdarsavn.

§ 2

Endamál stovnsins er innan Skúvoyar kommunu at:

fremja varðveitingararbeiði Skúvoyar Forminnafelags av forminnum og forngripum, í hesum sambandi at varveita gomul fuglaveiðu amboð, og útvega hús til tess.

seta mylluna aftur í uppruna stand.

varðveita/friða onnur støð og minni í bygdini/ oynni, sum hava týdning fyri bygdarsøguna.

savna og skráseta forngripir og annað siðsøguligt tilfar

seta upp siðsøguliga framsýning.

§ 3

Savnið verður stýrt av nevnd Skúvoyar Fornminnafelags víðkað við einum limi, sum Skúvoyar Bygdarráð tilnevnir. Nevndin skipar seg sjálv. Nevndin stendur aðalfundi Skúvoyar Fornminnafelags og Skúvoyar Bygdarráði til svars fyri ognum og rakstri stovnsins.

§ 4

Gevst savnið við virki sínum, verður farið fram eftir § 3, stk. 3 í løgtingslóg nr. 17 av 9. mai 1972 um bygdarsøvn við mentunnarsøguligum virksemi.

Lógin er samtykt á eykaaðalfundi Skúvoyar Forminnafelags

hin, 23/5 - 2010

og á fundi í Skúvoyar Bygdarráði

hin, 26/05 - 2010